# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# FÝRA MENN TRYGGJA JAVNSTØÐU

Í gjár var altjóða kvinnudagurin hildin kring knøttin. At hesin dagur hevur verið hildin í fleiri enn 100 ár sigur nakað um, hvussu torgongd leiðin hjá kvinnum til javnrætt hevur verið. Og tað er hugstoytt, at tað skal vera neyðugt at hátíðarhalda hendan dagin fleiri enn hundrað ferðir, tí hesin demokratiski trupulleikin átti sjálvandi langtsíðani at verið loystur.

Hóast ymisk sjónarmið, so valdar nú rímulig semja um, at vit skulu royna at manna nevndir og ráð so nøkulunda javnt við báðum kynum. Í politikki er ringt at seta kvotu á, tí soleiðis sum okkara demokratiska valskipan er skrúvað saman, so ber tað ikki til. Tí hvílir ein nógv størri ábyrgd á flokkunum um at skipa uppstillingina soleiðis, at bæði kynini hava sama rætt at verða vald.

Í fjør høvdu vit kjak um valskipanina – tað mundi verði meiriluti fyri at broytt valskipanina aftur í valdømi, soleiðis at vit fingu tryggjað »økisjavnstøðu«.

Eitt slíkt sjónarmið kann sjálvandi hava fólkaræðisligar grundgevingar. Men tá Edmund Joensen legði uppskotið um eitt valdømi fram stutt undan síðsta løgtingsvali var grundgevingin júst, at hetta fór at skapa størri javnstøðu á tingi. Tað er sjálvandi trupult at prógva, men vit kunnu so siga, at øll fólk í Føroyum við hesi skipan hava sama møguleika at velja ímillum øll valevnini, sum bjóða seg fram.

Hetta við »økiskvotering« móti »kynskvotering« er áhugavert, ikki minst grundgevingarnar: Tá til dømis ein sandingur skal veljast á ting, tí hann er sandingur. Hví skal so ein kvinna ikki veljast á ting, tí hon er ein kvinna?

Men sum vit hava sagt so mangan fyrr: Skulu kvinnur hava vald, so skulu menn missa vald, og tað er sera trupult hjá monnum at avgeva vald uttan svørðslag.

Jóannes Eidesgaard skemtaði við, at hann var løgmaður í seinasta taliban-landsstýrinum – seinasta landsstýri uttan kvinnur. Tað fáa vit valla aftur, tíbetur.

Men tað ber altso væl til at fáa



javnstøðu á tingi - tað vil siga á leið líka nógvar kvinnur sum menn – uttan at gera tað við formellum kynskvoteringum. Fýra menn kunnu gera hetta einsamallir: Um Høgni Hoydal, Kaj Leo Johannesen, Jørgen Niclasen og Aksel V. Johannesen gera av, at í teirra flokkum vilja teir hava á leið eins nógvar kvinnur valdar, sum menn, so er trupulleikin loystur. Tað er í floksorganisatiónunum, at hetta skal skipast – og sum leiðarar í fýra av teimum størstu flokkunum, so hava teir buktina og báðar endarnar – spurningurin er so bara, um teir tora at sleppa øðrum endanum?

**Seinasta taliban-landsstýrið er farið í søguna...**

# Tónaskøld í Tøting

## Konsert við Martin Joensen, Annemarie Zimakoff og Holgar Jacobsen.



Komandi leygarkvøld 12. mars, skipar Tónleikasamtakið Grót fyri sera áhugaverdari konsert í Tøting í Syðrugøtu. Tey ið trína á pall í Tøting, eru tónaskøld ið hava ferðast kring heimin og tónaskøld, ið veruliga hava sett síni spor í føroyska tónleikalandslagið.

**Martin Joensen:**
Martin kenna vit øll. Martin gav fyri stuttum út fløguna "Kvøld". Nýggja útgávan hevur fingið sera góð ummæli, og kemur uttan iva at standa sum ein varði í føroyskari tónleikasøgu, eins og øll onnur verk hann hevur úr honum greitt.

Martin ferð saman við bólki sínum, at spæla løg av nýggju útgávuni.

**Annemarie Zimakoff:**
Annemarie er úr Suður Jútlandi, men annars búðsitandi í Keypmannahavn.

Annemarie skal verða í Føroyum í eitt hálvt ár, har hon umframt skal spæla konsertir sjálv, eisini gerð nakað av arbeiði í Plátufelagnum Tutl og hevur skeið í sangskriving.

Annemarie Zimakoff hevur útgivið tvær fløgur, Ivory (2008) og The Girl Without Music (2010), og hevur hon fingi nógv rós og góð ummæli fyri hesar útgávur og fyri hennara framførslur. Annemarie hevur verði á tourné við sínum tónleiki í USA, Týsklandi, Írlandi og aðrastaðni og nú verður Tøting í Syðrugøtu sett á hennara heimsatlas.

**Holgar Jacobsen:**
Kenna tit Tinganest og Holgar & Villmenn? Ja so kenna tit Holgar Jacobsen!

Vágamaðurin útgav seint í fjør sína fyrstu solofløgu "Ongan Veg", Sum heitið á fløguni sipar til, so ætlar Holgar ongan veg at fara, og vil við fløguni staðfesta eina nýggja byrjan. Tónleikurin hjá Holgari, er bæði skitin, heitur og vakur, og huglagið sera hugnaligt.

Grót hevur júst gjørt hølisbroytingar í Tøting, so tað verður spennandi at royna hølini í nýggjum hami, við so áhugaverdur og framúr dugnaligum tónaskøldum.



**Sleppa undan kringvarpsgjadi**

HELENA DAM Á NEYSTABØ
KJAK Á SÍÐU 14

**Fosturdráp ein vanlukka**

DÁNJAL M. JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 14

# Gott Bergtóra!

*»Vit hava tildømis ikki hugt upp á pensjónsviðurskiftini hjá okkum sjálvum. Vit løgtings- og landsstýrisfólk kunnu spara okkum upp til fulla pensjón upp á 16 og átta ár, og tað hava vit einki gjørt við...«*

Soleiðis segði Bergtóra Høgnadóttir Joensen, tingkvinna fyri Tjóðveldi, í Eygsjón í gjár. Fyri einaferðskuld hoyrdu vit eitt av fólkavaldu umboðunum á tingi nevna hetta, sum fleiri halda vera órímiligt, at politikarar skulu hava serstøðu at skava sær saman til feita almenna pensjón upp á nøkur fá ár.



Hetta er ikki bara kent í Føroyum, hetta er eitt fyribrigdi, sum eyðkennir politikarar í fleiri londum. Tað verður so ofta sagt, at makt korrumperar, og nakað nógv er um tað, tí tað eru altíð tey, sum sjálvi ráða fyri egnum viðurskiftum, sum skava mest til sín sjálvs. Tá talan er um virkiseigarar, so er kanska ikki so nógv at siga um tað – uttan tað, sum vit kunnu halda og meina. Men politikarar eru fólksins tænarar, tað gloyma teir bara so skjótt, og tí hava teir kraddað sær slíkar ágóðar, sum til dømis feita almenna pensjón upp á nøkur fá ár.

Vit taka hattin av fyri tí politikara, sum klárar at reisa hetta málið á tingi, so drív á Bergtóra!

Sosialurin

Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*